# Nógv ymiskt av seyði

**Árligi barnadagurin varð hildin seinasta fríggjadag. Og har var einki ullint yvir degnum, tí børnini høvdu veruliga gjørt sær ómak**

BARNATILTAK
*Snorri Brend*
*Myndir: Bárður Lydersen*



*Hvør barnagarður hevði sín bás, har børnini vístu fram alt tað, tey høvdu gjørt*

**Klaksvík:** Í longri tíð hava børnini í Klaksvík sæð fram til fríggjadagin í farnu viku.

Seinnapartin henda fríggjadagin lat nevniliga upp ein framsýning av einum hópi av lutum úr ull, sum hesi hundraðtals børnini sjálvi høvdu gjørt.

Talan er um børnini, sum eru knýtt at dagrøktini og barnagørðunum í kommununi, og sum ein dag um árið hittast til ein serstakan dag við nógvum ymiskum á skránni.

Fríggjadagurin 29. apríl var so tann stóri dagurin, tá framsýningin lat upp.

### Kann koma aftur

Fram til henda fríggjadagin høvdu tey arbeitt við ull. Nú skuldi so vísast fram fyri foreldrum og øðrum áhugaðum, alt tað tey høvdu greitt úr hondum.

Og tað var ikki hissini lutir, sum hesi børnini høvdu gjørt. Har vóru bóltar, prýðislutir, slangur, hálsbond, ymiskt av og um seyð og mangir aðrir lutir, umframt ein hóp av myndum.

Sum skilst hava børnini veruliga stríðst fyri at úrslitið skuldi gerast so gott sum tilber. Tey hava tøvt og tey hava veruliga tikið ímóti øllum tí, sum starvsfólkini á barnagørðunum og dagrøktini hava lært tey.

Starvsfólkini hava sjálvi fingið undirvísing í arbeiðinum við ullini, og sigast kann, at tey hava fingið nógv burtur úr, og hava haraftrat dugað at lært frá sær.

Tað er tí ikki at taka seg aftur í, at fleiri av børnunum hava stuttleikað sær so nógv, at tey hava spælt at tey tøvdu, eisini tá tøvingin var liðug.

Ull var Føroya gull fyrr í tíðini. Kanska tann tíðin kemur aftur.



*Framsýningin var sera væl vitjað, og øll gleddust um teir mongu lutirnar, sum børnini høvdu evnað til*

# Kór og solo í Fríðrikskirkjuni

**Toftir:**
Kristi Himmalsferðardag klokkan 20 verður áhugaverd konsert í Fríðrikskirkjuni á Toftum. Á skránni er bæði kór og solosangur.

Kórsanginum stendur "Kórið hjá Jóhan" fyri. Hetta er blandað kór við út ímóti 30 sangarum.

Kórið hevur vant annanhvønn leygardag í skúlanum í Runavík. Á skránni hjá kórinum eru bæði føroysk og útlendsk løg, bæði við og uttan klaverfylgispæl. Nevnast kunnu vakra svenska lagið "Ge mig en dag", kenda Elvis-lagið "Precious Lord, take my hand" og ein negro spiritual "All my trials". Anja Hansen spælir undir hjá kórinum.

### Tónlistabreyt

Í hesum skúlaárinum byrjaði tónlistabreytin í 10. flokki í skúlunum í Runavík og á Toftum. Sjey næmingar á tónlistabreytini fara at syngja solo.

Dentur hevur verið lagdur á, at næmingarnir á tónlistabreytini í hesum skúlaárinum skulu fáa avbjóðingar av ymsum slag. Teir hava fyrr í skúlaárinum verið á palli og sungið rútmiskan tónleik fyri eini fjøld av fólki.

Hetta fara teir at royna eina ferð aftrat seinni, men á hesari konsertini snýr tað seg um klassiskan solosang. Meðan Martin Restorff Jacobsen, prestur spælir undir, fara næmingarnir at syngja ariur burtur úr "Messias" av Händel, "Ave Maria" av Schubert og Bach/Gounod, "Panis Angelicus" av Cesar Franck og "Caro mio ben" av Tommasi Giordani.

Tveir av næmingunum fara at syngja eina duett av Schubert, og lærarin á breytini, Jóhan Mortensen, fer at syngja burtur úr "Die schöne Müllerin" av Schubert.

Fríðrikskirkjan er ein góð kirkja av hava konsert í, og vóna fyrireikararnir at væl av fólki leitar sær hagar í morgin.

**sb.**

# Føroyskt heimsmet í undirsjóvartunlum

**Sandoy:** Føroyar kunnu gerast tað landið í heiminum, sum fær longsta undirsjóvartunnilin til bilferðslu.

Verður avgerð tikin um at fara undir gerð av undirsjóvartunlinum millum Streymoynna og Sandoynna, so verður henda um 12 km. long, skrivar danska Motormagasinet.

Heimsins longsti undirsjóvartunnil finst – í løtuni! – í Japan, og er hann 9,6 km. langur.

Tá talan er um Norðurlond hevur Noreg longsta undirsjóvartunnlin. Hann er 8 km. til longdar.

Danska blaðið veit at siga frá Landsverki, at ein tunnil um Skopunarfjørð fer at kosta einar 600 mió. kr.

Væntað verður, at kostnaðurin kann ikki einans kann fíggjast við bummpengum, tí ferðslan ikki verður so stór.

**sb.**